


Mynd: *Frants Restorff er stong og ongi rundstykkir eru at fáa í Tórsgøtu longur*

*Mynd Rólant Waag Dam*

# Ongi rundstykkir í Tórsgøtu

**Fríggjadagin stongdi Frants Restorff í Miðbýnum, og harvið eru ongi rundstykkir ella wienerbreyð at fáa í Tórsgøtu longur**

STONGT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Frants Restorff í Tórsgøtu er stongt og letur ikki upp aftur. Sostatt mugu tey, ið vanliga leitaðu sær til Frants í Tórsgøtu finna sær leiðir, tá tey vilja hava eitt rundstykki ella eitt wienerbreyð aftur við kaffinum.

1. juli lat Frants Restorff aftur sum bakarí. Handilin hevur tó verið opin og at kalla óbroyttur síðani, men baksturin tú fekk higani hevur verið frá Gunleivi.

Men nú er tann kapitullin eisini liðgur, tá hurðin varð stongd hjá Frants Restorff fríggjadagin.

Tað er P/f Vørður hjá Justinussen-monnunum, sum herfyri keypti Frants Restorff og teirra ætlanir eru at ríva niður gamla bygningin, og í staðin reisa ein bygning, ið er fimm hæddir høgur og hevur pláss fyri 31 íbúðum.

Men tað er ikki einans íbúðir, ið tað skal vera pláss fyri í bygninginum. Hann skal ætlandi eisini húsa tænastuvinnu og handilsvirksemi í niðastu hæddini.

# Heilvágur úr havinum



*Lone Gram umborð á Vædderen*

**Granskarar umborð á Vædderen, ið hýsir Galathea 3-rannsóknarferðini, hava í royndum av sjógvi funnið bakteriur, ið kunnu vera roseobacter-bakteriur. Hesar drepa aðrar bakteriur og kunnu møguliga brúkast til at menna nýggjan heilivág**

GRANSKING
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Granskingarprofessarin

Lone Gram frá stovninum Danmarks Fiskeriundersøgelser sigur við Politiken, at ongar slíkar bakteriur vórðu funnar í Skagerrak ella í Norðsjónum, men at úrslitið var øðrvísi vestan fyri Føroyar, har nørast.

Enn er óvist, um talan er um júst hetta slagið av bakterium, men tað skal kannast á starvsstovum umborð á Vædderen.

- Bakteriur, sum kunnu drepa aðrar bakteriur, eru áhugaverdar, tí møguliga ber til at menna nýggjan heilivág av teimum, sigur Lone Gram, ið tó leggur afturat, at tað fer at taka drúgva tíð, áðrenn nakað ítøkiligt úrslit spyrst burturúr.

# Eivør er partur Av býarmyndini í Keypmannahavn

**Nú konsertin hjá Eivør í Tivoli nærkast, er andlitið hjá Eivør at síggja í donskum miðlum, men eisini í býarmyndini er Eivør vorðin sjónlig**

KONSERT

Á SAS Radisson hotellinum beint yvir av Palads biografinum í Keypmannahavn hongur ein risastór plakat av Eivør. Plakatin er 100 m2 10 metur høg og 10 metur breið.

Umframt plakatir sum hesa eru lýsingar við Eivør at síggja í donsku bløðunum.

Talan verður uttan iva um eina serliga konsert, har Eivør við sama bólki, ið hon nýtti á Kvinnukonsertunum í januar og í fjør, umframt eini strúkarakvartett fer at tolka sína fjøllbroyttu songskrá.

nud




*Plakatin við Eivør er sjónlig í danska høvuðsstaðnumd*